# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## 100 ára dagur hjá Josefinu

Nógv varð gjørt burtur úr, tá Joesfina Højsted helt 100 ára dag sín sunnudagin.

Dagurin byrjaði við gudstænastu í Funnings kirkju, og aftaná var døgurði hildin fyri innbodnum í bygdini.

Seinnapartin var fyrst hildin móttøka í heiminum hjá Emmu Hansen í Haldórsvík, har Josefina eisini býr. Her nýttu fleiri høvið at heilsa uppá hana, og aftaná var kaffi í Avhaldshúsinum.

So her varð alt gjørt til tess at heiðra hesa 100 ára gomlu kvinnuna.

**sb.**



*Josefina Højsted giftist í 1930 við Knúti Højsted. Hann andaðist í 1988, 87 ára gamal*

*Mynd: Sofus Johannesen*



*Prestur, Emil Olsen heilsar uppá Josefinu*

*Mynd: Sofus Johannesen*

### FAKTA

Navn: Josefina Højsted
Født: 15. januar 1906 á Eiði
Hjúnarstøða: Gift 7. desember 1930 við Knúti Højsted úr Funningi. Knút andaðist í 1988.
Bústaður: Hjá dóttrini Emmu Hansen í Haldórsvík

## Rani og Poul Hallur í starvsvenjing í Miðlahúsinum

Frá týsdegnum 3. til fríggjadagin 13. januar vóru Rani Nolsøe Johannesen, úr 9. flokki í Vágs skúla, og Poul Hallur Davidsen í 10. flokki í Sørvágs skúla, í starvsvenjing í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Í hesum sambandi settu vit teimum nakrar spurningar:

*Hví valdi tit júst hetta starvið?*

Tí at vit hugsaðu at tað kundi verða áhugavert.

*Hvat dámar tykkum at vera her?*

Okkum dámar væl at vera her, tí at her hendir nógv spennandi.

*Hvat hava tit gjørt higartil?*

Vit hava gjørt innsløg til blaðið við bæði aðrar praktikantar og onnur fólk. Eisini hava vit lært hvussu alt fer fram á Sosialinum, sum t.d, hvussu man ger myndir klárar við photoshop, til at koma við í blaðið, og hvussu man sjálvur ger eitt innslag og mangt annað.

*Kundu tit hugsað tykkum at arbeitt við hesum í framtíðini?*

Ja, tað kundi altíð hent.

*Gleða tit tykkum at fara aftur í skúla?*

Nei, tað gleða vit okkum ikki til.

*Hvussu er at verða í Havn?*

Tað halda vit er í fínasta slag!



*Rani Nolsøe Johannesen (v.m.) úr 9. flokki í Vágs skúla, og Poul Hallur Davidsen í 10. flokki í Sørvágs skúla, vóru í starvsvenjing í Miðlahúsinum í tvær vikur*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin